## Stór vinnulán

Føroysku vinnufyritøkurnar læna pengar sum ongantíð fyrr. Sambært einari uppgerð hjá Landsbankanum vóru vinnulánini 5,7 mia. krónur seinasta mánaðarskiftið, og tað svarar til ein ársligan vøkstur upp á 26 prosent. Gongdin er, at vinnufyritøkur læna meiri úr peningastovnunum, meðan lánini frá øðrum fíggingarstovnum minka. Samstundis vísir tað seg, at útlendskir fíggingarstovnar hava fingið fótin fastan í Føroyum.

## Nýggja heimasíðu

Meklaravirkið Inni, sum Føroya Sparikassi eigur, hevur fingið nýggja heimasíðu. Nýggja síðan er snøggari og greiðari enn tann gamla. Harafturat gevur hon teimum vitjandi fleiri møguleikar, tá tey leita eftir húsum, sum eru til sølu, og ætlanin er eisini at byggja síðuna út seinni, sigur Bergur Godtfred hjá Inni. Heimasíðan hjá Inni verður nógv vitjað, tí sambært vevmátingarlistanum er hon tann 8. mest vitjaða heimasíðan í Føroyum.

# nýskapan" í 2015

fyri at avtaka hesar forðingar, taka lógina um vinnuligan fiskiskap í álvara og krevja gjald fyri fiskidagar, so byrjar man nú at stuðla øðrum vinnum eisini. Hetta er stutt og greitt skeiv loysn.

### Hevur vinnan ikki ráð?

Sagt verður, at ov lítið verður granskað í vinnuni, tí vinnan hevur ikki ráð at granska, og at tí má tað almenna stuðla vinnugransking. Aftan fyri henda pástand liggur sama misskijing, sum tá íløgustuðul verður givin fiskiflotanum við grundgevingini, at vinnan hevur ikki ráð at endurnýggja seg. Soleiðis fungerar verðin ikki! Ein íløga verður ikki gjørd eftir, um verandi framleiðsla gevur ráð, men um úrtøkan av íløguni er væntað at verða nóg stór. Somuleiðis verður ein gransking sett í verk, um úrtøkan av granskingini verður mett at verða nóg stór. Soleiðis arbeiðir einhvør dugnalig fyritøka, soleiðis játta fíggingarstovnar lán, og tað eiga fólk í fyrisitingini eisini at vita.

Lat okkum gera eitt tankaeksperiment: Um tað almenna í staðin fyri at stuðla vinnugransking við kr 200 mió. árliga heldur býtti hesa upphædd út til vinnulívið, so er frágreiðingin um vantandi pening til gransking burtur. Og lat okkum hugsa víðari, at vinnan sjálv slapp frítt at gera av, hvat pengarnir skulu brúkast til. Hvussu nógv hevði tá verið brúkt til vinnugransking, haldi tit? Ikki nógv, tí pengarnir høvdu heldur verið brúktir til annað endamál í fyritøkunum! Og tað høvdu vinnulívsleiðslurnar gjørt fyri at menna fyritøkurnar og økja úrtøkuna mest møguligt.

Um man ivast í hesum tankaeksperimenti, so kundi man kanska í staðin gjørt eina spurnarkanning!

Um vinnulívsleiðslurnar sjálvar vilja prioritera annað enn gransking, so ger man bæði fyritøkurnar og landið fátækari við at tvinga tær heldur at brúka pengarnar uppá gransking. Harvið er vinnugransking í teimum nøgdum man nú ætlar als ikki rentabul fyri vinnulívið sum er, og vil tí minka heldur enn økja búskaparvøksturin.

Trupulleikin er ein heilt annar. Omanfyri var staðfest, at stóri studningurin til fiskivinnuna er ein orsøk. Aðrar orsøkir kunnu eisini vera, møguliga okkurt við búskaparstrukturinum í Føroyum, men í staðin fyri at finna hesar trupulleikar og loysa teir, so velur man at kasta pengar eftir órentablari gransking. Tað er tekin um dovinskap, at man ikki roynir at finna fram til veruliga orsøkina til at so lítið verður granskað í vinnulívinum, áðrenn man fer at kasta milliónir av krónum hvørt ár eftir fyritøkum, sum ikki hava hug at granska.

### Búskaparfrøði í Føroyum

Tá Andreas Heyde steig í land av Fortuna í skaldsøguni "Barbara", hevði hann við sær bók, sum hann gav Johan Hendriki í gávu. François Quesnay hevði skrivað, og Andreas Heyde greiðir frá hvør hann er:

> "Ja, det er en mand af den nye økonomiske skole, som de kalder den fysiokratiske. De vil nu have, at alt skal gå på en helt ny og ligesom mere naturlig melodi her i verden. De siger, at landbruget og jordens opdyrkning er den sande kilde til al rigdom, og selvfølgelig også bør spille den første violin i ethvert velstyret riges økonomi."
> ("Barbara", s. 151.)

Í øllum londunum rundan um Føroyar er henda búskaparfrøði avvíst fyri mongum árum síðani. Føroyskur vinnupolitikkur, bæði sum hann er niðurskrivaður og førdur út í verki ígjøgnum mong ár hevur víst, at tað er fysiokratiska hugsanin sum framvegis er ráðandi. At halda fast við fysiokratisku hugsanina er at ignorera tey framstig, sum eru hend í búskaparfrøði, síðani tað var partur av tí at liva í Føroyum, at man viðhvørt noyddist at fjala seg í fjøllunum fyri sjórænarum.

Henda búskaparfrøðiliga hugsan verður fasthildin av seráhugamálum, ið hava fyrimun av tí. Hetta verður gjørt við propagandu sum "gongst tað vinnuni væl, so gongur tað landinum væl", ein hugsan, ið er bæði skeiv og skaðilig! Og tíverri eisini av búskaparfrøðingum, sum eru til fals hjá seráhugamálum.

Tað er serliga torført at gera upp við hesa hugsan, tá seráhugamálini eru so sterk, og miðfyrisitingin so veik. Tað hevur helst verið gjørt í bestu meining, men føroyskur vinnupolitikkur hevur altíð verið til frama fyri seráhugamál. Hetta er enntá niðurskrivað í Vinnurit 1-5 frá 1998. Vinnumálaráðið, ið um rætt var vardi samfelagsáhugamál í staðin fyri sum higartil seráhugamál, hevur so vítt eg havi fylgt við, ikki havt ein búskaparfrøðing í starvi í minsta lagi síðani 2001, tá eg las Vinnuritini. Og tað eru politikarar neyvan greiðir yvir.

Tað er kanska at yvirtulka eitt sindur, men man hómar fysiokratisku hugsanina í granskingarstrategiini: "Umráðandi er at raðfesta natúrlig øki". Men havandi í huga nýliga álitið um granskararpark er tað helst júst henda hugsan, sum hevur sníkt seg inn her. Um økini eru natúrlig, so skuldu tey vunnið, eisini í javnari kapping um fígging.

Í øðrum parti sum verður í blaðnum næsta týsdag, skulu vit venda aftur til granskingina, hvussu hon kann geva úrtøku til samfelagið, samanhang millum úrtøku og fígging og onnur viðurskifti ein granskingarstrategi fyri Føroyar eigur taka við.

# Ongar gávur – ongar avtalur

**Mutur er alt ov vanlig í Norra – nú vil vinnan gera nakð við tað.**

*Jógvan Hugo Gardar, Oslo*

Fimta hvør fyritøka í norska arbeiðsgevarafelagnum Næringslivets Hovedorganisasjon (NHO), meinar at tey ikki hava fingið í hús nýggjar avtalur, tí tey ikki hava givið gávur til mótpartin sum tey hava verið í samráðingum við.

– Tølini eru ræðandi, sigur Sverre A. Larssen, stjóri í Byggenæringens Landsforening (BL), í eini samrøðu við Dagens Næringsliv (DN). Fleiri av limunum í BL hava seinnu árini staðið fyri skotum í samband við stórar muturgølur innan norska byggivinnu. Sverre A. Larssen sigur at tey nú arbeiða við at fáa kortlagt hvussu umfatandi muturtrupulleikarnir eru í vinnuni.

### Muturgávur

Larssen sigur at nógvu gølurnar vísa at fleiri fyritøkur hava brúk fyri eini hjálpandi hond til at skilja ímillum eina áoskylduga gávu og roynt mutur sum hevur til endamáls at lokka mótpartin til at velja tað fyritøkuna sum gevur dýrastu gávuna.

Erik Lundeby, ið hevur ábyrgdina fyri etikkarbeiðnum hjá NHO, sigur at mutur kemur alt ov oftani fyri í norsku vinnuni. Hann sigur í samrøðu við DN at tølini prógva at mutur hevur verið og er ein trupulleiki.

– Tað eru fleiri søgur um persónar sum í samband við samráðingar um nýggjar avtalur siga at teir eru í gongd við at byggja upp í privathúsini. Og so fær viðkomandi at vita at møguligi avtalupartnarin hevur tilfar til yvurs, sum so persónurin fær, sigur Erik Lundeby.

### Dømdur fyri mutur

Í Norra eru fleiri umfatandi muturgølur komnar undan kavi seinastu tíðina. Fyri knøppum tveimum vikum síðani bleiv fyrverandi stjórin fyri bygningunum á Ullevål Sjúkrahúsinum í Oslo dømdur fyri mutur. Han syrgdi fyri at ein byggiharri fekk byggiavtalur uttan kapping. Sum takk fyri hetta fekk stjórin pengar og ferðir. Dómstólurin sigur í síni niðurstøðu, at báðir túrarnir hann fekk goldið fyri ikki kundu sigast at hava faglig innihald. Tískil var hetta at tulka sum mutur. Nú skal stjórin inn at sita í tvey ár og tríggjar mánaðir. Harafturat leggur dómstólurin hald á 864.196 norskar krónur. Stjórin hevur bara viðgingð at hann hevur fingið pengarnar.

Hetta er taá fyrsta muturmálið sum hevur verið roynt í einum norskum dómstóli eftir at lógarverkið bleiv gjørt strangari í 2003. Fleiri mál eru á veg.

Norska byggivinnan roynir nú at seta málið ovast á breddan, og vil hava fyritøkurnar til betri at skilja munin á eini gávu og roynum mutri.



*Ein eksotisk ferð er nú ikki so galin. Og ein slík sum gáva kann fáa harðar stjórar at verða heldur bleytari í eini samráðingarstøðu*